# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Føðingar



*25. mai fekk Maria Garðshodn Arge, 6 ár tvær lítlasystrar*

25. mai fekk 6 ára gamla Maria Gardshodn Arge tvær lítlasystrar. Foreldrini eru Kelna Gardshodn Arge og Bjarni Arge, Keypmannahavn. Tær vigaðu 2540 gr og 2980 gr. Báðar vóru 48 cm langar

7. apríl fingu Martina og Ólavur Hansen, Klaksvík eina dóttur. Hon var 51 com long og vigaði 3150 gr.

10. mai fingu Asta Østerø og Eyðun Thorgeirsson, Klaksvík ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 3000 gr.

1. juni fingu Ása Dam og Rúni Weihe, Fuglafjørður ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3560 gr.

4. juni fingu Linda og Fríðfinn Jacobsen, Skálabotnur eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 2950 gr.

5. juni fingu Elisabeth og Jón Sólsker, Eiði ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4500 gr.

8. juni fingu Gunrið Christiansen og Jov Lindenskov Helgason, Kollafjørður eina dóttur. Hon var 48 cm long og vigaði 3200 gr.

8. juni fingu Lis í Selvindi og Øssur Højgaard, Strendur eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3600 gr.

10. juni fingu Vivian A. Højgaard og Suni Jacobsen, Argir eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3675 gr.

11. juni fingu Durita og Johnny Mikkelsen, Skála eina dóttur. Hon va 53 cm. long og vigaði 3250 gr.

**Dagurin**
**12. juni. Basilius.** Helst til minnis um Basilius tann Stóra, sum var biskupur í Kesara. Hann doyði í 379.
*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!

# Maria og Hákun gullbrúdleyp



Sunnudagin 14. juni hava hjúnini Maria og Hákun Zachariassen í Streymnesi verið gift í 50 ár og kunnu halda gullbrúdleyp.

Maria er dóttir Hansinu og Jørgen Poulsen, ættað av Eiði sum búsettust á Oyrabakka. Tey fingu sjey børn. Hákun er sonur Jóhonnu og Zacharias Zachariassen, úr Streymnesi. Tey fingu níggju børn.

Hákun fór sum ungur til skips og sigldi við ymiskum trolarum til hann mitt í 60-unum legðist upp á land og stovnaði sína egnu fyritøku innan bilavinnuna. Alt frá taxakoyring til buss- og lastbilakoyring, inntil hann fyri fáum árum gavst, tá synirnir yvirtóku virksemið.

Hákun og Maria hava rikið fyritøkuna saman øll hesi árini. Samstundis sum hon tók sær av heimi og børnum. 67 ára gamal gavst Hákun í bilavinnuni. Síðani hann gavst í bilavinnuni, hava jørð og seyður fylt nógv í teirra dagligdegi, og hevur hann verið ógvuliga virkin innan landbúnaðin og er hann tað enn tann dag í dag.

Maria og Hákun eiga 6 børn: Heðin, Hjørleif, Eyð, Fríðu, Birnu og Inga. Barnabørnini eru 16 í tali, umframt 5 langommu- og langabbabørn.

Teimum verður ynskt hjartaliga tillukku á gullbrúdleypsdegnum sunnudagin tann 14. juni 2009.

Dagurin verður hildin saman við børnunum.

# »Dønninger« í Smiðjuni



*Fríggjadagin 12. juni letur framsýningin "Dønninger" hjá Kirsten Mørup Jeppesen upp í Smiðjuni í Lítluvík*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Fríggjadagin 12. juni kl. 14 letur framsýningin "Dønninger" hjá listakvinnuni Kirsten Mørup Jeppesen upp í Smiðjuni í Lítluvík í Havn.

Kirsten, sum er búsitandi í Helsinge í Danmark, er hálvføroysk, mamman er føroysk, Alma, dóttir Hans Nielsen, úr Kvívík. Hetta er sjeyndu ferð, at Kirsten sýnir fram í Smiðjuni.

Seinastu nógvu árini hevur Kirsten málað. Fyrst vóru tað mest alvarellir, men seinnu árini hevur hon málað nógvar oljumálningar, umframt at hon ger ymiskt annað. Á framsýningini eru umleið 40 oljumálningar.

Framsýningin verður opin til og við týsdagin 16. juni, allar dagar frá kl. 14 – 20.